DAGSINS MEINING

Skal Danmark binda okkum verjupolitiskt?

Verjupolitiska støða Føroya er vorðin eitt kjakevni, eftir at uttanlandsnevndin hjá løgtinginum samdist um ikki at geva løgmanni nakað endaligt tilmæli um ætlaðu útbyggingina á Eiði, fyrr enn fleiri upplýsingar eru fingnir til vega, og eftir eitt aðalorðaskifti um føroyskan trygdarpolitikk.

Men tíverri fekk kjakið eina løgna slagsíðu, tí uttanlandsnevndin var ikki samd um tíðindaskrivið, sum formaðurin sendi út saman við sjálvari niðurstøðuni. Hetta er at harmast um, tí tað er neyðugt, at føroyingar hava eitt seriøst orðaskifti um føroyskan verjupolitikk, tí nú hava vit fyri fyrstu ferð møguleikan at siga okkara hugsan í samband við eina ætlan hjá NATO.

Í tíðindaskrivinum verður vístil hernaðarsamtyktirnar. Tað eru samtyktirnar, sum Løgtingið gjørdi, tá tingið mótmælti, at støðir vórðu bygdar, og at hermenn vórðu knýttir at støðnunum á Sornfelli og á Eiði. Tann seinasta samtyktin er frá 1970, tó at ein onnur samtykt um Føroyar sum kjarnorkufrítt øki frá 1984 vísir til tærgomlu samtyktirnar. Í kjalavørrinum hava politikkarar nú meldað út, at heimurin er broyttur og at neðugt er at endurskoða hernaðarsamtyktirnar.

Talan er um fleiri prinsipiellar spurningar. Vit vórðu limaðir inn í NATO sum partur í Danmark. Føroyingar vórðu ikki spurdir. Skulu vit krevja, at verða hoyrd í hesum málin, eins og vit fingu høvi at vera uttan fyri EEC, tá Danmark fór uppí? Støðirnar komu uttan at landsstýrið og løgtingið vistu nakað um tað. Bara løgmenninir vórðu kunnaðir. Skulu vit góðtaka hesa framferð. Hermenn vórðu knýttir at støðunum, hóast løgtingið seg nei? Skulu vit góðtaka, at hermenn verða verandi her?

Um vit góðtaka limaskap, støðir og hermenn, er tað so ikki okkara skylda, at vit eisini manna støðirnar, heilt ella partvíst við føroyskum trygdarhermonnum? Ella skulu vit halda fram at ganga við hondunum fyri eygað, sum Sambandsflokkurin eftir øllum at døma vil.

Harafturat kemur tannprinsipielli spurningurin: hvør skal vera avtalupartur, um Eiðis-støðin skal byggjast út? Føroyar og NATO ella Danmark og NATO, sum hevur verið tað vanliga.

Her Tjóðveldisflokkurin eina greiða politiska støðu sambært Útvarpinum. Hann sigur, at um vit skulu binda okkum til NATO - og verandi SSSB-Far-verkætlan er ein binding, sigur hann - so skulu Føroyar verða avtalupartur. Hetta er ein greið og áhugaverd støða. Anfinn Kalsberg, løgmaður, var biðin um eina viðmerking, men hann fór rundan um spurningin.So er spurningurin: hvat siga hinir flokkarnir til henda rættiliga prinsipiella spurningin í okkara trygdarpolitikki? Í tí sjálvstýristilgongd, vit eru í, er eitt sindur bakvent, at Danmark skal binda okkum inn í framtíðina.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Bill Justinussen, familju- og moralmálaráðharri

Katrin Dahl Jakobsen, løgtingskvinna

Hin 14. mai í ár gingu Miðflokkurin og Tjóðveldisflokkurin saman sum politiskt par. Hetta varð boðað frá í tíðindaskrivi, at hesir vildu fylgjast í eina samgongu. Fólkaflokkurin og Sjálvsstýrisflokkurin høvdu longu frammanundan givið hvør øðrum ja. Sum hini bæði lovaðu í filminum Titanic, tá einki var til ráða at taka- you jump, I jump! Soleiðis fingu vit kristiliga Tjóðveldisflokkin og Sjálvsstýrisfólkaflokkin at skipa tað, tey rópa eina sjálvsstýrissamgongu. Hon kom út eftir at løgmaður hevði ligið á akkurát ein dag styttri enn gás.

Motivini fyri at ynskja at loysa, og tí koma sær upp í eina sjálvsstýrissamgongu, eru eftir øllum at døma eins klokkuklár fyri Miðflokkin, og tey eru fyri t.d. makkaranum Tjóðveldisflokkinum, hóast tey kunnu tykjast ymisk. Fyri viku síðani sigur familjumálaráðharrin Bill Justinussen við Dimmu eina av orsøkunum til, at Miðflokkurin vil hava fult sjálvsstýri vera, at rákið úr Danmark er so negativt. Vit eru einasta norðurlandið, sum ikki hevur frítt pornografi og fría fosturtøku, og tí hava vit færri og færri ting til felags við danir og sigla hvør sína kósí. Also, danir og tað ið rekst inn á okkum haðani er so vemmiligt. Tí mugu vit loysa! !

Eina løtu freistast tú at øvunda ráðharranum at vera komin inn í eina so vælsignaða einfalda verð. Hvør hevði tað ikki verið gott at verið har?

Hugsi ikki samstarvspartnarin hjá Bill, Høgni Hoydal, hugsaði so einfalt, tá hann fyri fýra árum síðani lat seg í sjeymílafullveldisstivlarnar (tó skeivt uppá bein). Ikki hevur hann óttast danska rákið, tí eingin hevur verið so dúgligur sum hann at draga danskar lógir niðan í tingið, so mikið stórt virði, sum hann hevur sæð í teimum. Sjálv havi eg, vegna Javnaðarflokkin lagt eitt ríkislógartilmæli fram, júst um tað, sum Bill Justinussen gremur seg um. (løgtingsmál nr. 16/2000). Uppskotið snúði seg m.a. um styrktar reglur móti kynsligum ágangi móti børnum og ungum og um barnaporno. Føroyar var einasta land um okkara leiðir, har barnaporno hevði frítt slag. Við hesi lógini, sum varð einmælt samtykt, er barnaporno nú eisini bannað í okkara tryggað landi. So her var myndin hin øvugta av tí, Billurin sigur við Dimmu. Eitt danskt rák ella hugskot, sum tingið fegnaðist um.

Rák valdast. Í løtuni er tað høgrarákið sum er um at kvala okkum úr øllum heraðshornum. Ikki minst frá okkara egnu her heima seinastu fýra árini, og nú framhaldandi við Bill og hansara samgongu. Nýggja ósolidariska hugtakið ábyrgd av egna lívið, var eitt av teirra mongu borgarligu egofostrum. Ein uggi er, at tá ein tið (long?) er fráliðin frá so sterkum ráki sum hesum, er mótrák væntandi.

Men tá nú rákið úr Danmark, er so negativt, sum Bill Justinussen vil vera við, hvat man hann so halda um rákið úr Føroyum, um tað nú var so, at vit vóru so mikið stór, at vit veruliga setti okkara spor úti í heimi?

Hvat munnu tey halda um tað, at ein ráðharri sum Bill Justinussen, sum eg vænti altíð vil vera sannur og erligur, at hann vælsignar og stuðlar einum stýri við oddamonnum, sum ikki kenna munin á egna og annara?

Ella um tey samkyntu, at tey longu nú, áðrenn nakað mál er komið á borðið, ikki vita um teirra umstøður batna ella kanska versna uppaftur meir?

At kvinnur í 2002 verða ómynduggjørdar?

Men aftur til romantikkin. Vit mugu loyva okkum at krevja, at tá ið nú Miðflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hava gjørt av at fylgjast, hava valt hvønn annan, játtað tykkara trúskap og skrivað undir samgonguskjal – at tit so gevast at keglast um tað, tit samdust um, og ikki støðugt misbrúka samkynt og kvinnur bara til partapolitiska profilering.

Nú nærkast!

Randi í Jógvanstovu

Ja, nú nærkast tíðin, har avgerðin fellur. Avgerðin, sum fer at mynda framtíð okkara, sum búgva her, og eisini tey, sum ætla sær at koma higar.

Verður her livandi eins og her hevur verið higartil, ella verða vit enn einaferð offrað fyri útbyggingini av føroyska samferðslukervinum?

Tað fasta sambandið um Leirvíksfjørð merkir, at bundið verður fast millum næststørsta bý í Føroyum og restina av landinum. Alt gott um tað. MEN her skulu vit hugsa um, at vit,ið liva her í dag, eru púra einki vita um ta nøgd av ferðslu, vit fara at uppliva, tá ið koyrandi verður um fjørðin. Tað nyttar einki at tosa um, at í Havn eru so og so nógvir bilar um samdøgrið í onkrari rundkoyring. Vit kunnu als ikki fyrihalda okkum til tað og taka eisini hjartaliga synd í teimum, sum noyðast at liva í hesum gangi dag og dagliga.

Tey, sum ung eru í dag og hava bygt sær hús í Leirvík, eru kedd og kenna seg ótrygg. Tey hava bygt beint har tey hava bygt, júst tí at tey kendu á sær, at har er friðarligt og gott at vera.

Vit ynskja, at her eisini framyvir skal verða gott at vera.

Tað kunnu tit hjálpa okkum til, titið skulu taka avgerð, ta avgerð, sum avgerð framtíð okkara, framtíð okkara sum ein bygd, har framhaldandi er gott at vera.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari: Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Rullandi redaktionin:
tel. 220507

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstoðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Nú dusa teir sær rættiliga í heimastýrinum.

Jóannes Eidesgaard

Unga Tjóðveldið boðaði í tíðindaskrivi frá, at nú var meira neyðugt enn nakrantíð áður, at politiska skipanin ikki slapp at dusa sær í heimastýrinum. Somuleiðis ávaraði eisini Kjartan Hoydal í róðu á fólkafundi á Doktaragrund ímóti, at hin "gamli hugnaligi løgtingspolitikkurin" aftur fekk valdið. Men líkt er til, at ávaringarnar frá bæði ungum og tilkomnum ikki vinna frama hesaferð. Tí ongantíð so nógv sum júst nú dusa vit okkum í heimastýrinum, og sanniliga kann løgtingspolitikkurin ikki sigast annað enn, at hann er stakhugnaligur - trý mál í fýra mánaðir.

Vanligt er, at tá nýggj stjórn tekur við í londunum rundan um okkum, so fáa nýggju ráðharrarnir frið í 100 dagar, áðrenn eitt nú fjølmiðlar og andstøða fara at seta fram spurningar og annars at ganga teimum eitt sindur nærri. Hetta er sjálvandi fyri, at nýggja stjórnir í verki hava havt møguleikan at vísa á ein politikk, sum tær ætla at reka, og soleiðis at nýggju ráðharrarnir hava havt møguleikan at seta seg væl inn í arbeiðið.

Eins vanligt er tað, at nýggjar stjórnir, sum veruliga vilja nakað, og tað vilja tær flestu, longu innan 100 dagar stinga nýggju politisku kósina út. Hetta sóu vit týðiliga við stjórnini hjá Tony Blair og eisini við nýggju stjórnini hjá Anders Fogh. Tá 100 dagar vóru gingnir, var leiðin greið.

Og hvussu er so vorðið her hjá okkum - vit hava jú havt løgtingsval. Vit høvdu løgtingsval 30. apríl - í gjár vóru fýra mánaðir ella 120 dagar síðani - og sama samgonga hevur jú sitið bæði undan og eftir vali, tó við tí lítlu broyting, at Miðflokkurin er komin við. Trý mál í 120 dagar. Og um vit so eru eitt sindur "large" og siga, at landsstýrið fyrst var skipað 6. juni, tá eisini trý nýggj landsstýrisfólk vóru vald, so eru tað hóast alt 87 dagar síðani.

Tey trý málini, ið eru komin frá landsstýrinum til dagin í dag, eru:

1. Løgmansrøðan á ólavsøku - hon skal haldast sambært stýrisskipanarlógina.
2. Áseting av fiskidøgum - teir skulu ásetast innan 18. august
3. Ein eykajáttanrlóg - landsstýrið tørvaði pening.

So ikki kann sigast annað enn, at politiska skipanin dusar sær og hugnar sær.

Tó skal sigast til Miðfloksins rós, sjálvt um eg ikki er samdur í øllum, sum teir koma við, so er tað hesin lítli flokkur, sum hevur verið mest frammi. Uttan hann hevði verið tunnligt hjá følmiðlunum.

Rættiliga løgið kortini, at eitt landsstýri, sum hevur bjóðað seg fram at stjórna landinum komandi fýra árini, kann vísa so stórt atgerðarloysi. Tað mátti tó verið okkurt at trivið í, ella kann tað hugsast, at skuldsetingarnar, settar vóru fram í summar, fullkomiliga hava lammað bæði løgmann og landstýrismenn.

Vit løgtingsmenn fáa sanniliga okkara løn fyri lætt í hesum døgum. Ikki kann sigast annað enn, at landsstýrið dusa sær.

Andstøðan – Tjóðveldisflokkurin og samgongan

Áki Andreasen

Tað er ikki eiti á sum tað leikar á hjá andstøðuni – afturhaldinum á Føroya Løgtingi. Fyrst var tað skipanin sum var galið við – tað var burtur í vón og viti at hava tað stýrðisskipan – sum ikki er seriga gomul – sum vit hava. Alt sum hevði nakað við demokrati at gera var farið fyri bakka við hesi skipanini; krop á kroppi komu javnaðar og sambandsfólk fram og hildu fyri at nú var galið í Føroyum – nú var alt rent fast

Skipanin svartiper

Eg haldi tað vera sjálvsamt og eisini markháttligt at framstandandi politikarar sum Jóannes Eidesgaard og Lisbeth Petersen rópa um geilar og tún at hetta ber ikki til at sitandi samgonga kundi halda fram, tí fólksins dómur var fallin o.s.fr. Grundgevingin var tann at løgmaður við stýrisskipanini í hondini kundi halda fram – stuðlaður av Tjóðveldisflokkinum; bert fyri at vera sitandi við valdið.

Tað hvørki sømir seg ella er borgan fyri sunnun politikki at geva skipanini skyldina fyri eitt valúrslit sum ikki kundi undirbyggja og tíðansheldur føra til samganguskift.

Tað minni ikki sørt um barnagarðsmoral – har børnini halda alt vera gott meðan tað er teimum til vildar, men melur tað so hinvegin so er galið.

Tað er eftirhondini alment kent at ætlanin hjá Sambands og Javnaðarflokkinum eftir valið var at skipa samgongu saman við Miðflokkinum – við 16 tinglimum, Jóannes Eidesgaard skuldi so verða Løgmaður og afturfyri bleiv Edmund Joensen Løgtingsformaður – og verið vís í at tá hevði einki verið galið, tá hevði skipanin verið bæði góð og tíðarhóskandi, men tíbetur bleiv henda ætlan av ongum.

Skal politikkur í Føroyum vinna virðing millum manna og aðrastaðni við, má hasin fornermisligi politikkurin leggjast á hyllina.

Hvat halda hini???

Tá samgongan var skipað og summarið var í hæddini bleiv eitt sindur av rumbli – eftir at ein ávís grein hevði staði í bløðunum.

Andstøðan raknaði sjálvandi við og viðmerkingar um sakarmál, samgonguslit og persónreinskan blivu mald aftur og aftur - eitt kjak í sær sjálvum er bara sunt; men so kundi andstøðan ikki halda sær meira; "Hetta eru óheppin siginal at senda til útheimin" segði afturhaldið í ein munn.

Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin hava alt seinasta valskeið sent so óheppin siginal til útheimin sum nakar politiskur flokkur kann gera. Teir hava ferð eftir ferð illtonkt landsstýrið, og heldur tikið viðmerkingar frá donskum politikarum til sín. Givi umheiminum fatan av at í Føroyum býr eitt fólk sum ikki vil frælsi, teir royndu av øllum alvi at fáa politiska leikpalin at líkjast einum klandursgarið.

Um tað er teirra fatan at umheimurin heldur at fáfongd og politiskt ófrælsi eru viðilig siginal, so er okkurt sum má endurskoðast ikki bara hjá Javnaðarflokkinum.

Hvar er tað virðiliga í at lata ein part at valdinum liggja aðrastaðni enn hjá Føroya Løgtingi??

Hvar er tað virðiliga at hava umsitingina av dómsvaldi og Løgreglu í øðrum landi???

Hvar er tað virðiliga í at lata donsku stjørnina umboða almennu Føroyar fyri umheiminum og teimum viðurskiftum sum har eru???

Hvar er tað virðiliga í at verða í einum felagsskapið har eini parturin hevur nógv meiri vald enn hin, og enntá gjalda við sínum egna sjálvstýrði og frælsi???

Nei tað eru siginal sum eru so óvirðilig og niðurgerandi – at umheimurin stendur fullkomuliga óskiljandi fyri tí sambandspolitikki sum Javnaðar og Sambandflokkurin standa fyri.

So lati verða við at gera eitt innanhýsis samfelagsmál í Føroyum til nakað sum tað als ikki er!!!!!

Tjóðveldisflokkurin og samgongan

Í eina longri tíð hevur Sosialurin og Dimmalætting gjørt ógvuliga nógv við at kanna hvussu skili er innanhýsis í Tjóðveldisflokkinum. Enntá hava hesi bløð ditta sær at bólka Tjóðveldisflokkin upp: "hovligi vongurin", "viðgongdi vongurin", "sosialistiski vongurin", "borgarligi vongurin" o.s.fr Hetta er so blivi knýtt saman við samgonguna sum Tjóðveldisflokkurin er partur av, og at tað er ein ella annar formur fyri ósemju í flokkinum. Tað telur líkasum ikki við at bæði formaðurin í Tjóðveldisflokkinum og formaðurin í tingbólkinum hava sagt og skrivað at Tjóðveldisflokkurin er partur av samgonguni og stuðlar henni flut og heilt.

Men tað er eitt ella annað sum ger at tað er ørvisi tá talan er um Tjóðveldisflokkin, analysur og viðing er alt fyri eitt á skránni, oddagreinar á rað viðgera Tjóðveldisflokkin, tað sum tjóðveldisfólk hava sagt og skrivað fáa eina heilt aðra demisjón enn tá eitt nú Jóannes Eidesgaard setur spurnaðartekin við stýrisskipanina í Føroyum, ella tá formaðurin í Sambandflokkinum leggur eitt heilt landsstýrið undir at siga hálvgum ósatt – tað kom fleiri ferðir fyri tá samráðingar vóru millum stjørnina og landsstýrið.

Í seinastu samgongu bleiv Tjóðveldirflokurin lagdur undir at hugsað fullveldið, fullveldið og aftur fullveldið; hóast tað var ein pástandur meir enn nakað annað, men nú er so eitt nýtt samganguskjal undirskrivað, sum leggur dent á trivnaðarmál; og mín sann um tað ikki eisini er galið, eg veit ikki hvat ikki bleiv sagt um Tjóðveldisflokkin tá undirskrivingin var veruleiki. Tá veit afturhaldi væl at henda samgonga hevur stórar og viðfevnandi fyrireikingar í gongd at yvirtakað nøkur stórmál, men tað velur man sjálvandi at sígggja burtur frá.

Tjóðveldisflokkurin hevur enn einaferð prógva at hann er ein ábyrgdarflokkur, sum stendur fyri frælsi og samfelagsábyrgd. Endaliga vil eg bara gera afturhaldinum greitt at Tjóðveldisflokkurin er einasta borganin fyri framhaldandi frælsisstríði og tá komið er á mál vita vit at eisini tit fegnast saman við okkum!!!